











# Marglætis raðhús í Varðagøtu

Í Varðagøtu standa 6 nýggj raðhús. Talan er um eitt raðhús, sum er til sølu.

**Stílur og innrætting**
Raðhúsini eru sera snotislig, nútímans, ljós, løtt og hava ein snøggan opinleika við stórum vindeygum. Innan er alt málað hvítt og stóru vindeyguni, sum eru frá loft til gólv gera, at tú fært ljósið inn í alt húsið. Eingir loftslistar og geriktir eru. Alt er gjørt úr fyrsta floks tilfari frá a til ø. Brandmúrur er ímillum og ljóðtætt er, eins og var tað eini sjálvstøðug hús.

Húsini eru í tveimum hæddum á 90 fermetrar, til samans 180 fermetrar. Eisini hoyrir ein skúrur til húsini.

Í niðaru hæddini er durur, vaskirúm, kjallararúm, gongd, baðirúm, tvey kømur og stova/uppihaldsrúm. Í ovaru hæddini er eitt kamar, hjúnarúm við egnum baðirúmi, gestavesi, stova og køkur í einum og grovkøkur.

Portur verður gjørt ímillum húsini og Varðgøtu og kunnu børnini spæla uttanfyri, uttan at tú hevur ampað av ferðsluni. Portrið er fjarstýrt og hevur hvørt húsið tvær fjarstýringar.

**Umhvørvið**
Við Varðagøtu eru tveir skúlar, barnagarður, vøggustova og handil. Gundadalur, sum er størsta og best útbygda plássið í landinum til ungdómin eftir skúlatíð, liggur beint við. Her er Svimjihøll, ítróttarhallir, fótbóltsvøllir, tennisvallir, badmintonhøll og skjótt eisini rennibreyt á Hálsi.

Útsýnið er gott yvir býin og fjørðin.

Ynskir tú at keypa húsini, hevur tú tveir valmøguleikar, sum eru:

prísuppskot: kr. 3.050.000 fyri lyklaklár hús.

prísuppskot: kr. 2.850.000 tá er tað uttan baðirúmsmøblar, grovkøk og køk.

Tú fært meira at vita um húsini við at ringja til Skyn á tlf. 35 74 00. Sí eisini www.platform.fo

**Fakta:**

| | |
|---|---|
| Adr. | Varðagøta 79, Tórshavn |
| Byggiár: | 2008 |
| Hæddir: | 2 |
| Støðd innan: | 180 fermetrar |
| Grundøkið: | 90 |

skyn

Tlf. 357400 · Tórsgøta 16 · www.skyn.fo